DAGSINS MEINING

Hvar er sosiala samvitskaTjóðveldisfloksins?

Í gjár samtykti løgtingið fíggjarlógina fyri næsta ár. Ongantíð áður hava útreiðslurnar verið so stórar. Og í prinsippinum hevur løgtingið ongatíð samtykt so stórar íløgur sum løgtingið ger í hesum døgum. Tá verður hugsað um Suðuroyarskip og havnaløg í Suðri og í Havn fyri tilsamans meiri enn 400 mió.kr. og tunnil um Lorvíksfjørð fyri einar 350 mió.kr.

Hetta eru óívað tekin um, at tað gongur væl í føroyska samfelagnum. Eftir nøkrum árum hevur føroyska samfelagið reist seg úr øskuni. Fyri einum 6-8 árum síðani vóru eini 5000 fólk arbeiðsleys. Hús og íbúðir vórðu handlað fyri nakrar fáar hundrað túsund krónur. Ídag fæst hvørki arbeiðsorka ella býli. Í hvussu er ikki fyri vanlig fólk. Hús í høvuðsstaðnum fara í dag lættliga fyri hálvaaðru millión.

Samstundis sum løgtingið samtykkir størstu fíggjarlógina nakrantíð og størstu íløgurnar nakrantíð, eru hvørki ráð at hækka pensjónir, seta nóg mikið av til heilsuverkið ella seta pening av til íbúðagrunnin. Tað eigur at geva fólki nakað at hugsa um.

Helena Dam á Neystabø skjeyt upp at hækka pensjónirnar slakar 30 mió.kr. Men uppskotið varð felt. Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin skutu upp at strika greinina, sum heimilar at pensjónir verða javnaðar. Eitt torskilt mál, men sum hevur til endamáls at forða fyri, at grundupphæddin undir øllum pensjónum so líðandi verður undirgrivin. Hóast hetta uppskotið bara kostar einar 15 mió.kr., so verður tað eisini felt.

Øll ásanna, at fólkapensjónin og aðrar pensjónir eru ov lágar, men tíverri er ikki vilji at hækka hesar. Í landsstýrissamgonguni er ein flokkur, sum higartil hevur verið at telja millum teir sosialt tilvitandi flokkarnar. Men hvar er Tjóðveldisflokkurin í dag?

Á hesum stað er fleiri ferðir nevnt, at ein almennur íbúðapolitikkur má rekast, og at peningur má setast av til ískoyti til íbúðabygging. Men eins og undanfarin ár, verður ikki eitt klovið oyra sett av. Á hesum stað er ferð eftir ferð víst á, at einstaklingar, eitt nú pensjónistar ella eisamallar mammur við børnum, hava ikki ein livandi kjans at ogna sær eini hús ella eina líkinda íbúð. Men hvat gera Tjóðveldisflokkurin og tann sosial-liberali Sjálvstýrisflokkurin? Fella uppskot at bøta pensjónsviðurskifti og játta ikki eitt oyra til íbúðagrunnin! Her í blaðnum er fleiri ferðir gjørt vart við støðuna á íbúðarmarknaðinum, eitt nú við samrøðum við Randi Frederiksberg, sum setti fokus á tann spurningin í høvuðsuppgávu og fekk tvey 13-tøl. Hon nam eisini við ta komandi oljuvinnuna, sum bara økir um tørvin á íbúðum.

Nú tekur bæði Búskaparráðið og fakfelagið hjá Búskapar- og løgfrøðingunum undir við sjónarmiðnum hjá okkum og rópa varskó. Hesi ásanna nú, at vantandi íbúðapolitikkur forðar fyri, at fólk flyta til landið og forðar samstundis fyri menning her á landi. Men landsstýrið vil eftir øllum at døma heldur lívga húsa- og íbúðaspekulatión enn skipa ein veruligan íbúðapolitikk! Vit spyrja aftur: - hvar er sosiala samvitska Tjóðveldisfloksins?

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Viðvíkjandi dystinum ímillum Søljuna og St.Ì.F

Andrea Nielsen
form. í Søljuni

Viðvíkjandi hondbóltsdystinum ímillum Søljuna og St.Ì.F. Ein dystur skuldi verða á Giljanesi 13.12. 2001. kl. 18:00. Spælarnir hjá Søljuni, dómarnir sum H.S.F. hevði sett til dystin og áskoðarar vóru møttir upp, men St.Í.F. møtti ikki, ongi avboð vóru komin.

Nú lesa vit í blaðunum, at Jógvan Martin Mørk sigur, at dysturin skal spælast. Út frá hvørjum sigur hann hetta. Í grein 6.05 í reglunum fyri hondbólt stendur: Møtir eitt lið ikki uttan avboð ella er tað ikki spæliklárt, kann kappingarnevndin avgera dystin taptan fyri viðkomandi lið.

Ikki nokk við tað. Søljan møtti eisini til ein annan leikdag, sum H.S.F hevði ásett, tá møtti St.Í.F. heldur ikki upp, tá kom avboð 2 tímar áðrenn dysturin skuldi spælast, tá vóru okkara spælarar sum eru í Havn, longu komnar vestur og tær sum vóru her vesturi høvdu fingið sær frí, tí tær skuldu spæla.

Men hesuferð komu als ongi avboð, sama skili, genturnar høvdu fingið sær frí, tí tær skuldu spæla ein avgerandi dyst, hitaðu væl upp komu inn á vøllin beint áðrenn kl. 18:00, men ongin at spæla ímóti.

So Jógvan Martin Mørk, hvat hava vit eina reglugerð til, um hon ikki skal haldast, líka fyri øll. Í fjør tapti Tjaldur ein dyst ímóti V.B., tí tær møttu ikki. upp.

Vit í Søljuni føla okkum fyri tað turra spot, møta upp 2 ferð og hitt liði møtir ikki.

Viðvíkjandi dystinum er dómaraseðil skrivaður, dómarnir hava skriva undir. Fyri okkum er dysturin endaliga avgreiddur. Vit møta ikki upp 3. ferð.

Við hondbóltskvøðu.

Åbent brev sendt til Siumut og Lars Emil Johansen, MF

Jóannes Eidesgaard
partiformand, Føroya Javnaðarflokkur

I forbindelse med den nyoprettede folketingsgruppe "Den Nordatlantiske gruppe" var der et interview med Lars Emil Johansen, MF og Kuupik Kleist, MF i den færøske radio sidste søndag.

Lars Emil Johansen sagde, at han ikke kunne bidrage selvstændigt overfor kravet om selvstændighed på Færøerne, men at han ville gøre det som talerør for Høgni Hoydal, landsstyremedlem og Torbjørn Jacobsen, MF.

Føroya Javnaðarflokkur skal gøre opmærksom på, at kravet om selvstændighed i den sammenhæng, som Høgni Hoydal og Torbjørn Jacobsen fremstiller det, er et krav, som kun et mindretal af den færøske befolkning kan tilslutte sig. Derfor er Føroya Javnaðarflokkur meget forundret over, at en repræsentant for Siumut for det første gør sig til talsmand for et mindretal på Færøerne tilhørende Tjóðveldisflokkin og dernæst tager initiativ til direkte at blande sig i interne færøske politiske anliggender.

Afgørelsen om de fremtidige relationer mellem Færøerne og Danmark er en sag, der selvfølgelig alene skal afgøres her på Færøerne. Dette er gentagne gange også blevet understreget af danske politikere, senest af statsminister Anders Fogh Rasmussen i hans åbningstale, hvor han direkte viser til det forslag, der blev vedtaget af et næsten enstemmigt Folketing den 10. maj i år, hvor der bliver sagt, "at Folketinget tilkendegiver, at det er den færøske befolkning, der afgør Færøernes fremtidige tilknytningsforhold til Danmark. Det gælder såvel et ønske om at etablere en suveræn stat som et ønske om at udvikle samarbejdet inden for rigsfællesskabet"

Det bekymrer os i Føroya Javnaðarflokki, at vi ikke i denne sag kan fastholde den gamle kendte kurs, hvor vi i respekt for hinanden ikke blander os i interne politiske stridigheder i vore to lande.

Enn eitt pulvurbrævi USA

Hesaferð var tað amerikanski varauttanríkisráðharrin, Richard Armitage, sum fekk eitt bræv við hvítum pulvuri

ÚTLAND
Fartekst

Richard Armitage fekk kortini ongantíð brævið, tí myndugleikarnir fingu fatur á tí, áðrenn tað kom á skrivstovu hansara.

Talsmaðurin hjá uttanríkisráðnum sigur, at brævið kom við postinum. Har varð tað kannað, og fyribils bendir einki á, at nakar heilsuvandi stendst av innihaldinum, sigur talsmaðurin.

Uttanríkisráðið sendi alt fyri eitt boð eftir serfrøðingum at kanna pulvurið, sum var í brævbjálvanum.

Fimm amerikanarar eru deyðir av miltbrandi seinastu mánaðarnar. Myndugleikarnir váttaðu í gjár, at tað var onkur í USA, sum sendi brøvini við teimum vandamiklu miltbrandssporunum.

FBI hevur nevnt, at tað helst var onkur við tilknýti til fregnartænastuna CIA, sum sendi brøvini.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Atgongd til haruhagar og aðrir tankar um fiskiloyvir

Jóannes Jacobsen

Fiskimálaráðharrin sigur, at hann ætlar at steðga allari spekulatión við fiskiloyvum. Hetta er alla æru vert, men leisturin, hann leggur fyri dagin at gera hetta upp á, virkar ikki. Hann skuldi heldur roynt gamla, men einfalda háttin at fordeila brúksrætt til tilfeingi, sum verður brúktur við góðum úrslitum nógva aðrastaðni í føroyska búskapinum. Marknaðarmekanisman eigur at sleppa at royna seg.

Haruhagar og fiskastovnar
Haruhagar og fiskastovnar líkjast á mangan hátt. Bæði eru staðfest sum ogn, ávikavist hjá einstaklingum og Føroya fólki, bæði tilfeingini finnast bara í avmarkaðum nøgdum og í báðum førum er tað ikki ognarrætturin, men brúksrætturin til fysiska avkastið av tilfeinginum, ávikavist rávøran harur og rávøran fiskur, sum fólk gjarna vilja hava fatur á.

At eftirspurningur er eftir avmarkaða tilfeinginum ger, at tað fær eitt búskaparligt virði, sum kann realiserast á ymsan hátt. Men greitt er, at av tí at nøgdin av tilfeingið frá náttúrunnar hond er avmarkað, kunnu bara nøkur fá av teimum, sum vilja hava atgongd til tilfeingið, fáa hesa atgongd.

Mannaskaptur munur
Grundleggjandi munurin millum haruhagarnar og fiskastovnarnar er ikki, at onnur rávøran ikki dugir at svimja og hin ikki kann renna. Munurin er heldur ikki, at tað í tí eina førinum eru privatpersónar sum eiga tilfeingið, meðan tað í hinum førinum er tjóðarogn.

Munurin liggur í mannaskaptu fordeilingsskipanini av brúksrættinum, t.e. hvussu avgjørt verður, hvørji tey fáu skulu vera, sum fáa brúksrættin, av øllum teimum, sum vilja hava atgongd til tilfeingið.

Haruhagar
Ein upplagdur møguleiki er at brúka marknaðarmekanismuna til at velja út, hvør fær brúksrættin til tilfeingið. Brúksrætturin til haruhagan verður greitt og einfalt seldur á uppboði til hægstbjóðandi. Við hesi skipan fáa tey brúksrættin, sum halda seg kunna fáa sum best burtur úr tilfeinginum, og tí eru sinnað at gjalda mest fyri atgongumerkið.

Eigarin av haruhaganum hevur sjálvsagt ein áhuga í, at so nógv fólk sum gjørligt bjóða upp á tilfeingið. Tí er seljarin líkaglaður við, um persónurin við hægsta boðið eigur eina byrsu ella ikki, um hann hevur byrsuloyvi ella ikki, og í heila tikið hvussu hann ætlar sær at fáa sum mest gagn fyri latna peningin.

Fiskatilfeingi
Ein annar møguleiki er, at eigarin ella umboð hansara sjálvur velur út nakrar persónar. Hesir persónar, sum verða útvaldir eftir einhvørjum leisti, fáa so rávøruna fyri eitt gjald ella ókeypis.

Hetta er tann háttur, sum føroyskir politikkarar eru glaðast fyri, og sum teir brúka til útveljing av, hvør skal hava atgongd til tilfeingið. Føroyska fiskatilfeingið – ogn Føroya fólks – verður ókeypis latin persónum, sum politikkararnir velja út.

Ein stórur trupulleiki við hesi seinnu mannagongdini er, at tað eru útvaldir einkultpersónar heldur enn Føroya fólk, sum jú er upprunaligi eigarin, sum fáa búskaparliga virðið av rávøruni. Hvat høvdu partaeigararnir í einum partafelag sagt til, at leiðslan gav yvirskotið burtur? Ein annar er, at tað er ógvuliga tilvildarligt, hvørt tey, sum fáa tilluta fiskatilfeingi, eru tey, sum kunnu skapa størst virðir burtur úr tilfeinginum. Men størsti trupulleikin er, at henda mannagongd elvir til spekulatión.

Spekulatión
Møguleikin fyri spekulatión uppstendur nevniliga í tí løtu, eigarin av einum tilfeingi við búskaparligum virði gevur til kennar, at hann fer at geva tað burtur fyri minni, enn tað er vert. Í døminum við føroyska fiskiríkidømINUM verða milliónavirði givin burtur fyri einki, og tað er ein sjálvfylgja, at bíðirøðin við teimum, sum fegin vilja hava ein part av hesum virðum í gávu, er lang sum eitt ónt ár.

Fyri at velja tey fáu, sum fáa tilfeingi, burtur úr teimum mongu, sum vilja hava tilfeingi, verður diskreminerað á ymsan hátt. Bara føroyingar kunnu koma upp í part, bara fólk við bláum eygum, bara fólk, sum áttu eina dangu í 1978, ella hvat politikkararnir finna fyri gott. Hetta er sentralpolitisk stýring av einum slag, sum gomlu kommunistarnir í Kreml høvdu verið stoltir av.

Spekulatiónin gongur so út upp á at vera ein av teimum útvaldu, sum fáa lut í fiskiríkidømINUM uttan at gjalda marknaðarprís fyri tað, fyri síðan at selja tað víðari - fyri marknaðarprís sjálvandi - til onkran av teim óhepnu, sum vóru tveitt úr bíðirøðini, men sum gjarna vilja hava fatur á rávøruni. Um einhvør, sum vil hava brúksrætt til føroyskt fiskatilfeingi, men varð tveittur úr bíðirøðini, rindar marknaðarprís til Føroya fólk ella til onkran annan, er hann sjálvandi líkaglaður við.

Sostatt syrgja marknaðarkreftirnar fyri at fiskatilfeingið endar hjá teimum, sum virðismeta tað hægst, ikki orsakað av, men hóast almenna føroyska politikkin á hesum øki. Spurningurin er bara, um tað er upprunaligi eigarin av tilfeinginum ella spekulantar, sum stinga marknaðarvirðið í lumman.

Strangari krøv økja um spekulatiónina
At diskriminera meira effektivt við fleiri krøvum til tey, sum verða vald út til at fáa tilfeingi, minkar ikki um spekulatiónina. Tað ger tað bara enn meira lønandi at vera ein av teimum nú enn færri, sum kunnu skaffa uttanfyristandandi rávøruna. Nýggjasta uppskotið um strangari krøv til tey, sum fáa fiskatilfeingi, fer tí ikki at steðga spekulatiónini, men skaffa teimum, sum yvirliva útveljingina, enn fleiri fyrimunir. Einki er tí at siga til, at tey, sum standa í bíðirøðini í dag og vita, at tey ikki verða tveitt út við teimum nýggjastu krøvunum, sjálvsagt eru fegin um ætlanirnar. Og bardagin fyri at sleppa upp í part aftur verður enn harðari enn áður.

Ein betri skipan
Tá er skipanin, ið verður brúkt til haruhagarnar og flest alla aðra fordeiling av búskaparligum virðum, nevniliga marknaðarmekanisman, munandi smidligari og effektivari. Politikkararnir sum heild og - fiskimálaráðharrin serliga - kundu í heila tikið lært nógv av at hugt nærri at skipanini við haruhagunum. Ella hevur nakar hoyrt um spekulatión við haruhagum?

Um tann til eina og hvørja tíð sitandi fiskimálaráðharri uppførdi seg, sum eitt umboð fyri upprunaliga eigaran av fiskinum eigur at gera og seldi fiskin av fyrstan tíð, ístaðin fyri at geva hann burtur, var eingin spekulatiónsvinningur at heinta, tí eigarin hevði longu fingið vinningin.

At eigarin ella umboð hansara selur tilfeingið fyri marknaðarprís, er sostatt einasti háttur at forða fyri spekulatión. Tá velja marknaðarkreftirnar heilt av sær sjálvum tey út, sum á besta hátt kunnu realisera búskaparliga virði, sum býr í fiskinum, meðan spekulantarnir mugu leita aðrar leiðir.

Niðurstøða
Niðurstøðan má vera, at politikkararnir sýna ógvuliga lítið álit á, at marknaðarkreftirnar kunnu syrgja fyri, at sum best fæst burtur úr fiskiríkidømINUM. Summir trúgva kanska heilt einfalt ikki upp á, at marknaðarkreftirnar virka. Ein annar upplagdur møguleiki er sjálvsagt, at teir ikki hava hóming av, hvat marknaðarkreftir eru fyri nakað.

Í so fall vil eg mæla teimum til at fara á eina námsferð antin á uppboðssølu av haruhagum ella í føroysku heimamarknaðarvinnuna. Har brúka tey nevniliga marknaðarkreftirnar og prísmekanismuna til at útvelja tey, sum skulu hava vørurnar. Hesin fordeilingsháttur syrgir fyri, at eingin møguleiki er fyri spekulatión, og tí er ikki neyðugt við einum ráðharra, sum brúkar útveljingsmekanismur,ið hoyra heima á forngripasavnum fyri kommunistiskt rekafæ.

Sjómannafótbóltur í Klaksvík

SJÓMENN
Tíðindaskriv

Aftur í ár verður fótbóltur fyri sjómenn í KÍ høllini í Klaksvík 28. dec.

Byrjað verður kl 08 á morgni og hildið verður á til klokkan hálvgum fýra. Fiskimannafelagið heldur fund í Klaksvík sama dag, og eftir fundin verður borðhald fyri øllum luttakarum/ spælarum. Øll fiskiskip, sum ætla at luttaka í fótbóltskappingini, skulu boða frá luttøku ikki seinni enn fríggjadagin 21/12 á telefon 217739 ella 220086 ella fax 457611. Luttøkugjaldið sum er 1.000 krónur verður at flyta á konto 102.049.2 í Norðoya Sparikassa, sigur Palli Ziskason, sum er ein av fyrireikarunum.